Songrøddin út at ferðast

Songrøddin fer nú at ferðast. Byrjað verður nú fríggjakvøldið 3. november í Gundadalshøllini í Havn. Leygarkvøldið 4. november er Songrøddin á Sandi.

Annars er skráin hendan (við fyrivarni):

3. november:	**Tórshavn**
4. november:	**Sandur**
10. november:	**Norðoyggjar**
11. november:	**Norðoyggjar**
17. november:	**Suðuroy**
18. november:	**Suðuroy**
24. november:	**Eysturoy**
25. november:	**Eysturoy**
1. desember:	**Vágoy**
2. desember:	**Finalan í Gundadalshøllini í Havn**

Hjálpargrunnurin fyri óarbeiðsførar fiskimenn

Eins og undanfarin ár verður aftur í ár møguligt at søkja um stuðul úr **Hjálpargrunninum fyri óarbeiðsførar fiskimenn.**

Grunnurin er stovnsettur í 1938, og er endamál grunsins at »yde tilskud til fiskere, som på grund af sygdom er blevet uarbejdsdygtige, og som ikke kan få tilstrækkeligt tilskud fra anden side«.

Ein treyt fyri at kunna søkja er, at læknin kann prógva, at viðkomandi er óarbeiðsførur fiskimaður. Hesin stuðul er persónligur.

Umsóknarbløð kunnu fáast við at ringja tlf. 1.1080 lokal 141 ella eftir arbeiðstíð á tlf. 1.6089. Um ivaspurningar eru, ber til at ringja til Borgarhjørt Kragesteen, skrivara í grunninum, ið er at hitta á somu tlf. nr.

Seinasta freist at lata umsóknarblaði inn er **fríggjadagin 8. desember 1995.**

Tórshavn, tann 26. oktober 1995

Hjálpargrunnurin fyri óarbeiðsførar fiskimenn
Postboks 64 (Tinganes), FR-110 Tórshavn
Tlf. 11080 - Fax 17032

Skeið á Sandoyar Meginskúla

í at lesa, bera fram og greina tekt

Í vikuskiftinum 10.–12. nov. verður skeið í at lesa, bera fram og greina tekst á bundnum og á óbundnum máli, hildið á Meginskúlanum.

Hetta er triðja skeið við hesum innihaldi. MÁF skipar fyri og endamálið er at skapa áhuga fyri føroyskum skaldskapi, áhuga at leita í okkara nútíð, søgu og siðsøgu, læra at skapa burtur úr føroyskum tilfari til pall.

Menna sjónleikarafeløgini kring landið til at umboða okkara mentan heima og úti við m.a. upplestri, frásøgn og leiki. Hugsað verður eisini um ferðamannavinnuna og virðið í skipaðum samstarvið, virðið í at hvør bygd ella hvørt øki kann fáa sítt sermerki fram í áhugaverdari frásøgn ella leiki osfr.

Áhugin at vera við á hesum skeiðum er stórur bæði á teim stóru plássunum og teim smærru, og hildið verður stigvist fram við kunning og frálæru.

Eisini fólk, ið ikki eru limir í Sjónleikarafelag, eru vælkomin við.

Sverri Egholm verður skeiðleiðari og afturat sær fær hann eitt hjálparfólk úr oynni.

Í Sandoynni eru ungmannafeløgini »Virkið« á Sandi, »Keldan« í Skálavík og »Samljóð« í Skopun, øll við sjónleikadeild limir í MÁF og »Sólarris« í Húsavík fer eisini at skipa sjónleikadeild.

Pláss er fyri 20 fólkum á skeiðnum, frálærutímarnir 12 og Sandoyar Meginskúli stuðlar tiltakinum við innivisti.



Nýtt føroyskt undirvísingarhefti um rúsdrekka

Til tess at upplýsa børnini og tey ungu um rúsdrekka, hevur Blái Krossur latið prentað eitt undirvísingarhefti við heitinum »PRO-fessarin, Spurnijørgin & MILLA«.

Undirvísingarheftið, ið er 17 blaðsíður (A-4 stødd) við litum, er serliga ætlað miðdeildini í fólkaskúlanum.

Við teksti, myndum, spurningum og uppgávum verður greitt frá um rúsdrekka, hvussu tað virkar og hvørja ávirkan tað hevur á menniskjuna. Eisini viðgerð heftið, hvørjir trupulleikar kunnu standast av nýtslu og misnýtslu.

Theodor Hansen og Amy Tausen hava týtt undirvísingarheftið til føroyskt, og útgevari er Blái Krossur í Føroyum.

Undirvísingarheftið, ið er prentað hjá Einars Prent, kostar 30 kr. stk. og fæst frá Bláa Krossi.





Minnisvarði yvir ST-hermenn

Sosialurin/
Stockholm

Týsdagin, á 50 ára degi Sameindu Tjóða, avdúkaði svenski kongurin Karl Gustaf minnisvarða yvir teir 61 sviarnar, sum hava latið lív í ST-ørindum.

– Allir meintu teir, at friður, frælsi og mannarættindi eru verd at stríðast fyri, segði formaðurin fyri svenska Ríkisdegnum, Birgitta Dahl, í røðu sini, tá ið minnisvarðin yvir teir falnu sviarnar varð avdúkaður.

Minnisvarðin stendur uttan fyri Sjóhistoriska Museet, beint við Djursgårdsbrunnsviken í Stockholm.

Bernadotte myrdur

Fyrsti sviin, sum læt lív í ST-ørindum, var Folke Bernadotte, greivi. Ísraelska Sternligan myrdi hann í 1948, beint sum hann stríddist við at fáa semju í lag imillum ísraelsmenn og palestinar. Fyrrverandi ísraelski forsætisráðharrin Yitzak Shamir var limur í hesum bólki, og tessvegna vóru viðurskiftini imillum Svøriki og Ísrael sera spent, tá tið Shamir sat við ræðið.

Í september 1961 læt táverandi ST-aðalskrivarin, Dag Hammerskjöld, lív, tá ið flogfar hansara datt niður í Kongo.